## HEILSANIR



**Góða mamma og kona**
Tillukku við 55 ára degnum 20. juli
**Heilsan Eyðun, Durita, John og Jan**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegnum tann 10. apríl. Somuleiðis nýta vit høvi at ynskja øllum eitt gott summar.
**Bjarni Berger, Mågevænget 55, Dragør**



**Brúdleyp**
Leygardagin 20. aug.2005 kl. 16 giftast í Sørvágs kirkju, Nanny Ritter og Poul Falkvard.Veitslan verður í Sørvágs Bio kl. 19.Tey ið vilja gleða brúðarparið vera biðin at siga frá á telefon 332006, 221863 ella 210568, áðrenn tann 10. aug. 2005.



**Hey tit øll**
9. august kunnu hesi bæði halda silvurbrúðleyp. Dagurin verður hindin í bygdarhúsinum í Miðvági leygardagin 13. aug. k. 19.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 266089 ella 333189 áðrenn 4. aug.
**Heilsan Borghild og Jorma**



**Elskaða Anna Elisabeth**
Hjartaliga tillukku við 22 ára føðingardegnum. Alt gott í framtíðini.
**Ynskir Benjámin**







Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Týsd. ☐ Mikud. ☐ Hósd. ☐ Fríggjad. ☐ Leygard.

Tekstur: ______________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navnið og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Bygd/býur: ______________ Tlf.: __________

Sendið lepan, vmynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


# Gospelkonsert á Nabb á ólavsøku

Magni Christiansen, Suð og Eyðun Jacobsen og døtur eru nøvnini, sum fara á pallin á stórari gospelkonsert í Ítróttarhøllni á Nabb ólavsøkudag. Hetta eru nøkur av kendastu kristnu tónleikanøvnunum í Føroyum.

Magni Christiansen arbeiðir við eini nýggjari fløgu, sum hann skjótt fer undir upptøkur av. Suð hava seinasta árið sligið navn sítt fæst, ikki minst við framførslunum av Abba løgum kring alt landið og í sjónvarpinum. Eyðun Jacobsen og døturnar Birgit og Kristina framføra vanliga í Kelduni í Skálabotni.

Atgongumerki eru at fáa í kunningarstovuni í Havn í forsølu og við dyrnar.

**nud**